


*Mitt á gólvinum stendur eitt stórt kar, har tey vaksnu kunnu hyggja niður í, meðan børnini síggja inn gjøgnum síðurnar.*

legging av Biofar, Føroya Náttúrugripasavni og Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya. Hendan ætlanin fór fyri bakka, men Íshúsið á Argjum stóð framvegis niðri við sjóvarmálan á Argjum - eitt framúr vælegnað stað til endamálið. Í 2005 savnaði Bjørki Geyti ein áhugabólk, og søkt varð um loyvi til at nýta Íshúsið til akvarium. Saman við peningi til smærri íløgur og rakstur játtaði býráðið í 2005 at lata húsið og økið rundanum til endamálið. Harumframt játtaði býráðið at fíggja rakstrinum av verkætlanini í 2006.

### Áhugabólkurin

Ein áhugabólkur er settur saman av fólki, sum av ymsum orsøkum hava áhugað fyri akvariuminum, tey eru eisini til gagns fyri verkætlanina, av tí, at tey við sínum førleikum kunnu stuðla uppundir akvariumið. Gunnar Djurhuus og Bjørki Geyti hava báðir starvast á Biofar. Teir eru kavarar, og hava drúgvar royndir frá alivinnuni. Magnus Gaard er lívfrøðingur við granskingar-, framsýningar- og undirvísingarroyndum. Og Suni Petersen er verkfrøðingur á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og hevur harumframt undirvísingarroyndir.

### Arbeiði í 2006

Teknisk leiðsla og góðar hendur eru neyðug fyri at stápla eitt akvarium upp á beinini. David Geyti, sum er útbúgvin fínmekanikari, og hevur starvast á Eksperimentarium í Keypmannahavn, hevur saman við pápa sínum Bjørka, staðið fyri øllum tí praktiska arbeiðinum í 2006. Nógvar fyritøkur og nógv fólk hava víst verkætlanini stóra vælvild, við at lata arbeiði gera sera bíliga ella at lata tilfar fyri niðursettan prís.

### Framtíðin

At vit ikki fyri langari tíð síðani hava fingið eitt alment akvarium í Føroyum kann tykjast løgi. 18 oyggjar mitt í Norðuratlantshavi, umgyrdar av sjógvi. Ofta hevur tað verið havt á tungu, men altíð hevur vegurin frá talu til veruleika verið ov tungur. Allar ætlanir, bæði stórar og smáar, eru farnar frá skrivaraborðinum og niður í onkra skuffu. Hendan verkætlanin er ein roynd at gera júst tað øvuta. At seta akvariumið upp fyrst, fyri at 447512fáa royndirnar, og síðan, í smáum ella í stórum, at byggja út so hvørt sum pengar og vilji eru til tess. Vit fara nú at fáa møguleika fyri at læra, hvørji djór eru góð at hava í einum akvariumi, og hvørji eru trupul at fáast við. Vit fara at royna ymsar framsýningar og aktivitetir til barnagarðar, skúlaflokkar, pedagogar, lærarar og almenningin. Harumframt hevði tað verið áhugavert, um ymsar maritimar granskingarverkætlanir vórðu skipaðar við støði í akvariuminum. Við somu vælvild frá býráðnum í 2007 og vónandi við øðrum stuðli og inntøkum umframt, skuldi verið gjørligt at fingið akvariumið í eina fasta legu í framtíðini.



*Bæði børn og vaksin kanna lívið í havinum.*

